DAGSINS MEINING

Drigin eftir hárinum

Fólkaflokkurin hevur einafer› afturat drigi› Tjó›veldisflokkin eftir hárinum - tá ta› sn‡r seg um mál, sum vinstravongurin vanliga stendur saman um. Eisini í málinum um eina eftirløn til allar føroyingar hevur Tjó›veldisflokkurin slúkt politikk Fólkafloksins rættiliga rátt. Eftir tí - meiri og minni ógrei›a - sum er komi› fram um ta ætla›u eftirlønina og sokalla›a skattalættan, so eru prinsippini um fólkatryggingina ta› grundleggjandi í uppskotinum.

Í nógv ár hava bæ›i politikkarar, fakfeløg og føroyingar sum heild ásanna›, at ney›ugt var vi› eini munadyggari ískoytispensjón, tí ta› fór at ver›a trupult at hækka fólkapensjónina munandi. Partvíst tí at tali› av pensjónistum ver›ur lutfalsliga stórt, samanbori› vi› tali› av fólki í vinnu, og partvíst tí at krøvini til alt fleiri samfelagsútreis›lur gerast størri. Hetta var ein orsøk til, at landsst‡ri›, sum tá sat, evna›i til ta samhaldsføstu arbei›smarkna›areftirlønarskipanina vi› einum grunni, Samhaldsfasta, í samrá› vi› arbei›smarkna›in.

Hesa skipan vóru bæ›i Tjó›veldisflokkurin og Sjalvst‡risflokkurin vi› til at samtykkja, men nú eru hesir flokkar meiri og minni noyddir at gó›taka eina skipan, sum setir ta› samhaldsfasta prinsippi› til viks. Eftir uppskotinum hjá Fólkaflokkinum ver›ur útgjald sett í mun til inngjald. Ta› merkir, at tey, sum forvinna nógv í arbei›sárum, fáa eisini eina gó›a pensjón. Eftir samhaldsføstu skipanini fáa øll ta› sama, hóast inngjaldi› er eftir inntøku.

Veikleikin eftir uppskotinum hjá Fólkaflokkinum er harafturat, at tey, sum einki forvinna, t.d. óarbei›sfør, fáa onga eftirløn. Hesi skulu so fáa eina hækka›a fólkapensjón. Og hetta kallar Tjó›veldisflokkurin samhaldsfesti!

Útmeldingarnar frá landsst‡rinum hava veri› ógrei›ar, hóast almanna- og heilsumálast‡ri› hevur arbeitt vi› hesum máli› í hálvtanna› ár. Og stø›an nú er tann beri hurlivasi, tí tey seinastu 10 árini hava tey flestu fakfeløgini fingi› sær sínar egnu skipanir, og hesar skulu nú fáast at sampakka vi› ta skipan, sum Fólkaflokkruin vi› stu›li frá Tjó›veldisflokkinum skal kroysta ni›ur yvir Føroya fólk, hóast øll fakfeløgini eru ímóti.

Fyri 14 døgum sí›ani bendi alt á, at løgma›ur fór at siga samstarvi› vi› Tjó›veldisflokkin upp, tí hann vildi ikki víkja frá ætlanini um fullveldi her og nú. Men fyri ikki at ver›a varpa›ur út, gó›tók Tjó›veldisflokkurin at fremja yvirøkur eftir tí gomlu heimast‡rislógini. Fyri at bera í bøtuflaka og fyri ikki at harma vi›haldsfólkini, royndi forma›urin so at siga alment frá, at eftir seks árum skuldi fullveldi› stovnast. Tá gjørdist løgma›ur so ó›ur, at Høgni Hoydal fekk greitt at vita, at makka›i hann ikki rætt nú, so var› Tjó›veldisflokkurin varpa›ur út.

Avlei›ingina síggja vit nú: Fólkatryggin hjá Fólkaflokkinum ver›ur veruleiki. Og skattalættin hjá Fólkaflokkinum ver›ur nú til ta›, at tey flestu skulu gjalda meiri í skatti!

NØVN Í VIKUNI

70 ár og gevst

Í dag hevur Tróndur Húsgar› í Havn sín seinasta arbei›sdag hjá Tórshavnar Kommunu – og sunnudagin komandi, 19. november, ver›ur hann 70 ár.

Tróndur er ein havnarmynd – hann er ein av teimum, i› dagliga síggjast koyra í gulu bilunum hjá Tórshavnar kommunu, tí hann er arbei›sforma›ur, og eingin veit so væl sum hann um kloakkirnar í Havn.

Á teknisku deild hjá Tórshavnar b‡rá› plaga tey at siga, at allar kloakkirnar í Havn eru í høvdinum hjá Tróndi Húsgar›. Og nú kommunan hevur roynt at lagt allar kloakkir og a›rar veitingar undir mold í kommununi á teldu, hevur Tróndur veri› hollur stu›ul hjá teldumonnunum.

Tróndur er gøtuma›ur. Hann er bóndasonur úr Sy›rugøtu, sonur navnframa bóndan, Líggjas Húsgar›, og Sofíu Mariu sum var frá Gøtugjógv.

Tróndur er tri›yngstur av átta systkjum. Hann var sum ungur á landbúna›arskúla í Noreg og arbeiddi har eina tí›. Hann giftist í Noreg í 1958 vi› Onnur úr Fuglafir›i. Hon er dóttir Hendrik á Bu› (Olsen), sum var frá Gøtugjógv og Katrinu (Trinu), sum var úr Elduvík, systir Jakku Haraldsen, keypmannin í Fuglafir›i.



Anna og Tróndur fluttu aftur til Føroya seinast í fimmtiárunum og bygdu í Brøttubrekku, har tey fluttu inn í 1963. Tróndur arbeiddi hjá Jar›arrá›num, har hann m. a. velti upp úr n‡ggjum og gjørdi uppdyrkingarvegir.

Tá Tórshavnar kommuna í 1974 fór at gera vegin úr Kaldbak til Hvítanes, fór Tróndur at starvast hjá kommununi sum arbei›sforma›ur. Teir byrja›u at gera vegin úr Kaldbak og arbeiddu seg inn gjøgnum fjør›in og út á Sund.

Tá hetta arbei›i› var li›ugt fyri umlei› 20 árum sí›ani, fór Tróndur at fáast vi› smærri arbei›i hjá kommununi í Havn, serliga kloakkarbei›i og smærri vegaarbei›i.

Av frítí›arítrivum hjá Tróndi eru at nevna, at hann er í›in í dansifelag Kaggans. Hann hevur seksmannafar og er ofta í fjør›inum, og nógvar summarferiur hevur hann fingist vi› at hoyggja í Gøtu. Eisini hevur hann putlast nógv í urtagar›inum rundan um húsini - og børnini hava eisini havt gle›i av at hava hann til gartnara.

Anna og Tróndur eiga f‡ra børn: Ey›un, sum er prentari og stjóri á Prentmi›stø›ini, Tórfinn, sum er snikkari, Hendrik, i› er maskinverkfør›ingur, Karin Margreta sum er verkfrø›ingur, men sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni.

Spyrji› serfrø›ingarnar Sosialinum

Fyrstu svarini síggjast í bla›num mánadagin

Bergur Hansen, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur

Ingi Højgaard, løgfrø›ingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldraflatti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Kragesteen. Fer›slutrygd

Julianna Næs, pedagogur

Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi

Turid Thomsen, lestrarveglei›ari

Marius Staksberg, málfrø›ingur

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merki›, hvørjum tit seta spurningum.

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum vi› gávum, blómum, fjarritum og uppringingum gleddu meg á 80 ára degnum. Eisini tykkum, sum komu inn á gólvi› og gjørdu dagin so hugnaligan.

Heilsan
Alvilda Bærendsen

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Farlei›in um Lorvíksfjør›:

Jagstra nú avloysaraskip

Strandfer›slan er farin at leita eftir einum avloysaraskipi fyri fyri Dúgvuna, sum ikki kann sigla næstu tríggjar vikurnar

SAMFER‹SLA
Ey›un Klakstein

Talan er um eitt størri putlispæl, nú Strandfer›slan skal royna at skipa farlei›irnar millum oyggjarnar uttan Dúgvuna og Ternuna.

– Ta› er sera trupult, tí vit rá›a ikki yvir nóg nógvum skipum, og tá so hvørki Dúgvan og Ternan ella kunnu sigla, er ta› ikki lætt at skipa samfer›sluna, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni.

Hann fekk mikukvøldi› bo› frá landsst‡rismanninum í samfer›slumannum um, at Strandfer›slan skuldi finna eitt avloysaraskip til Lorvíksfjar›alei›ina sum skjótast.

Hetta arbei›i› er nú í gongd.

Á middegi í gjár var talan um at leiga eitt skip úr Íslandi, men Strandfer›slan visti einki endaligt um hendan møguleikan, tá vit høvdu evstamark á bla›num.

Óheppin stoytur

Strandfer›slan hevur seinastu dagarnar arbeitt vi› fleiri ymiskum møguleikum at skipa samfer›sluna á sjónum komandi vikurnar.

Hetta hendi, eftir at ta› gjørdist greitt, at Dúgvan ikki fer at sigla næstu tríggjar vikurnar. Dúgvan liggur nú á skipasmi›juni á Skála, og í gjár komu menn fram til, at ta› fer at taka tríggjar vikur, á›renn Dúgvan kann fara í sigling aftur.

– Stoyturin hevur veri› beint undir motorinum, og ta› er mest óhepna sta›i›, ska›in kundi henda, sigur Magnus Magnussen, teknisk lei›ari á Strandfer›sluni.

– Og talan ver›ur ikki um tríggjar vikur vi› átta arbei›stímum um dagin. Ta› ver›ur arbeitt vi› fullari fer› fyri at fáa ska›an umvældan, sigur Magnus Magnussen.

Strandfer›slan umhugsar at seta gomlu Ternuna inn í siglingina um Lorvíksfjør›. Gamla Ternan var tikin úr hesi sigling fyri 20 árum sí›ani

Ymsir møguleikar

Í gjár sigldi Smyril aftur millum Klaksvík, Fuglafjør› og Havnina, men ta› er ikki greitt, hvussu leingi størsta strandfer›sluskipi› kann halda fram vi› hesi siglingini. Umfamt Smyril hevur Barsskor eisini gjørt túrar um Lorvíksfjør›, og a›rir bátar hava eisini veri› um fjør›in.

– Vit hava møguleikan at skunda undir arbei›i› at skifta motorar umbor› á Ternuni, men hetta arbei›i› fer at taka minst 10 dagar afturat. Vit kunnu seta gomlu Ternuna inn í siglingina fyri at taka naka› av tr‡stinum, men bæ›i tá talan er um gomlu Ternuna og Barsskor veldst nógv um, hvussu ve›ri› er, sigur stjórin á Strandfer›sluni.

Strandfer›slan ætla›i í gjár at koma vi› einum útspæli um, hvussu samfer›slan skal skipast komandi dagarnar, men hetta var ikki greitt, tá vit høvdu evstamark.

Ternan I um Lorvíksfjør›

SAMFER‹SLAN
Ey›un Klakstein

Strandfer›slan hevur bi›i› Skipaeftirliti› um undantaksloyvi til gomlu Ternuna, so hon kann flyta bilar um Lorvíksfjør› komandi dagarnar.

– Vit hava ikki fingi› endaligt svar enn, men líkt er til, at vit kunnu fáa undantaksloyvi í eina tí›, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni.

Ternan I plagdi at røkja siglingina millum Lorvík og Klaksvík, men ta› eru næstan 20 ár sí›ani, at skipi› var› tiki› úr hesi siglingini.

– Um vit sera gomlu Ternuna inn í siglingina, so er ta› bara fyri at taka eitt sindur av tr‡stinum, sum liggur á Smyril, sigur Reidar Nónfjall.

Strandfer›slustjórin misnøgdur vi› stø›una

– Ta› er langt úti, at vit í ár 2000 onga ferju hava at seta inn, tá tøvur er á tí, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandsfer›sluni

SAMFER‹SLA
Ey›un Klakstein

Stjórin á Strandfer›sluni hevur nógvar trupulleikar at stríast vi› í hesum døgum, og hann er sera misnøgdur vi› stø›una á samfer›sluøkinum

– Ta› er langt úti, at vit í ár 2000 onga ferju hava at seta inn, tá tøvur er á tí, sigur Reidar Nónfjall,

– Vit rá›a yvir einum flota sum hevur ein mi›alaldur upp á 31 ár, hóast eitt spildurn‡tt skip er á veg, og ta› elsta skipi› er 72 ár.

– Samstundis sum vit tosa nógv um, at n‡ggir ka›alar skulu leggjast millum lond fyri at tryggja okkum gott samskifti, klára vit ikki at hava eina nøktandi samfer›slu millum oyggjarnar. Ta› er burturvi›, heldur strandfer›slustjórin.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni, er misnøgdur vi› stø›una á samfer›sluøkinum. Strandfer›slan hevur ov fá og ov gomul skip at rá›a yvir

Gloyma samfer›sluna

Hann vísir á, at Strandfer›slan eigur ikki skipini, sum hon brúkar. Ta› er landi›, sum eigur skipini.

– Vit hugsa nógv um sambandi› vi› útheimin, men hvat vi› okkara egna landi›. Meginparturin av Føroyum er sjógvur, men vit klára ikki at skipa fyri nøktandi flutningi millum oyggjarnar. Ta› er ikki gott, sta›festir Reidar Nónfjall.

Stjórin og onnur starvsfólk á Strandfer›sluni stríast í løtuni vi› at loysa átrokandi trupulleikan, eftir at Dúgvan tók í botn mánadagin og ikki kann sigla næstu tríggjar vikurnar.

Men hóast møguleikarnir eru fleiri í tali, eru fáir teirra nøktandi.

Teir tóku land 5
- føroyingar í Grønlandi

Jógvan Arge hevur givið út eina nýggja bók í røðini "Teir tóku land". Greitt verður frá, tá føroyingar í túsundatali stevndu til Grønlands í 1959. Samstundis legði landsstýrið doyðin á at fáa nýggj rættindi. Tað eydnaðist, men føroyingar noyddust at avreiða til KGH fyri undirpris afturfyri.

Nýggjar útróðrarstøðir vórðu bygdar í Borgshavn, Kangarssuk og norðaru havn í Ravnsoynni, og Nordafar grundaði sítt flakavirki í Føroyingahavnini. Trolarar fóru við bátum til Eysturgrønlands, og stórreiðarin Jógvan Kjølbro í Klaksvík sendi eina heila konvoy av deksbátum hagar við flaggskipinum "Karin K" á odda.



Føroyski skipaflotin undir Grønlandi var størri enn nakrantíð. Millum Nuuk, Tórshavn og Keypmannahavn var álvarsom diplomatiskt ósemja um Eysturgrønland. Politikararnir og fólk vóru á gosi.

299,-

Jógvan Arge